# Fingu ein nýggjan lim í nevndina

Tað hendi ikki tær stóru kollveltingarnar á aðalfundinum hjá Skipara- og Navigatørfelagnum í Havn beint fyri nýggár.

Tí har vóru tríggir av teimum fýra nevndarlimunum, sum stóðu fyri valið, afturvaldir.

Tann fjórði bar seg undan afturvalið.

Tað var Mortan Poulsen á Eiði, sum ikki vildi veljast aftur.

Ístaðin fyri hann varð Jákup Gøthe valdur, hann var nevndarlimur áðrenn.

Teir tríggir, sum vórðu afturvaldir, vóru Jónberg á Mýrini í Sandavági, Regin Nónstein í Hvalba, sum er næstformaður og Ellintur Abrahamsen í Fuglafirði, sum er formaður

Í nevndini eru Harumframt, Jákup Múller í Saltangará, Rógvi Højgaard í Havn og Bjarni Kass í Havn.

Hesir tríggir vórðu valdir á aðalfundinum í 1998 í eitt tvey ára skeið og standa tí fyri vali á aðalfundinum seinast í ár.

Eykalimirnir verða valdir hvørt ár, og teir eru Egil Simonsen í Havn, Johannes Jacobsen í Havn, Harry á Lakjuni í Fuglafirði og Leivur Christiansen í Sandavági.

*–áki–*

# B36 setir segl

*Møguliga fer B36 at styrkja seg við útlendskum leikarum, nú teir skulu gera enn eina roynd at vinna meistaraheitið til felagið*

JÁKUP MØRK


*Kristian á Neystabø vil hvørki vátta ella avsanna tíðindini um útlendsku leikararnar*

Av heimasíðuni síðuni hjá B36, sum ikki er almenn enn, frættist, at hópur felagsins møguliga verður styrktur við einum ella tveimum útlendskum leikarum.

Talan sigst vera um ein álopssinnaðan miðvallara úr Svøríki umframt ein verjuleikara úr Noregi.

Talan skal vera um leikarar, sum nýggi svenski venjari felagsins, Pelle Andersson hevur havt samband við, og sum báðir hava sýnt áhuga í at koma til Føroya at leika.

**Ikki óhugsandi**

Kristian á Neystabø, formaður í B36, vil hvørki vátta ella avsanna tíðindini, við tað at hann metir, at tað enn er komið ov stutt áleiðis í hesum máli, men samstundis sigur hann, at tað ikki er óhugsandi at hópurin verður styrktur við útlendskum leikarum.

Hann sigur at teir í løtuni rokna við, at leikarahópurin verður á leið tann sami sum seinasta ár hóast nakað av til- og frágongd hevur verið, men at tað annars veldst um, hvørjar broytingar verða hópinum komandi ár.

Við hesum sipar formaðurin helst til, hvussu lagnan hjá Jens Kristiani Hansen fer at verða, nú hann í nakrar mánaðir roynir seg í skotskum fótbólti. Um núverandi leigusáttmálin seinni vísur seg at gerast til eitt keyp av liðformanninum, er talan í hvussu so er um ein sera týdningarmiklan part av hópinum, sum tá er broyttur.

# Nærvarp Okkara aftur í luftini

Síðan miðan desembur hevur føroyska røddin á 91,4 mhz á FM bandinum og 98,8 mhz á hybrid netinum í Keypmannahavnarøkinum verið pinnastill. Í stóru ódnini í Danmark tann 3. desember í fjør brotnaði sendimasturin, sum Nærvarp Okkara saman við fimm øðrum útvarpstøðum brúkar.

Nú er sendimasturin komin upp aftur,0 og høgtíðin er farin framvið, og tí sendir nærvarpið aftur sum vant.

Byrjað verður aftur nú fríggjakvøldið klokkan 20.00. Tað vera Niels Uni Dam, Barbara Christophersen, Kirsten Løth og Eyðfinn Drewsen, sum sita í sendihølinum.

Í sendingini verður hugt at nøkrum av teimum føroysku fløgunum, sum komu út hetta seinasta ártíggjundi.

Sunnudagin klokkan 13.00 verður nærvarpið aftur í luftini við tí vanligu sunnudagssendingini við tíðindum úr Føroyum og ymiskum innsløgum, siugr Nærvarp Okkara í tíðindaskrivi.

Viðmerking:

# Spurningur til landsstýrismannin í fíggjarmálum

Í sambandi við nakrar av trupuleikunum, ið hava tikið seg upp nú nýggja pensiónslógin kom í gildi á nýggjárinum, havið eg henda spurning til Bjarna Djurholm, fíggjarnevndarformann og Karsten Hansen, landsstýrismann í fíggjarmálum.

Hevur ein landsstýrismaður loyvi til at lýsa kunngerðir um t.d. stuðul eftir forsorgarlógini og almannapensiónslógini, tá hesar kunngerðir væntast at viðføra eykaútreiðslur fyri landsskassan fyri verandi fíggjarár uppá í minsta lagi kr (5)6 mió., og hesin peningur ikki er avsettur á fíggjarlógini ella umbiðin/ játtaður í eykajáttanarlóg?

Tá nýggja lógin um almannapensiónir kom í gildi á nýggjárinum, mistu avlamispensionistar rættin til avlamisveiting. Tann 20.12.99 kom kunngerð um stuðul til hjálparráð, har tey, ið eftir gomlu lógini høvdu (hava) rætt(mist) til avlamisveitingina, kunnu søkja um líknandi upphædd eftir § 18 í forsorgarlógini. Soleiðis sum kunngerðin er orða og sum eisini ætlanin var, so skulu fólk ið fara at søkja um henda stuðul kunna skjalprógva tær eykaútreiðslur, ið søkjast kann um endurgjald fyri.

Í fimmaranum 5. jan, segði landsstýrismaðurin í almannamálum tó, at øll, ið hava mist avlamisveitingina skulu hava eina upphædd svarandi til kr. 1870,- um mðr uttan at tað er neyðugt við skjalprógvum fyri eykaútreiðslur. Hetta er at gleðast um, men fyri at málið frá byrjan ikki skal gerast ein størri hurlivasi enn tað longu er vorið, so vil eg minna á at hetta ( í hesum fíggjarárinum)væntandi kemur at føra við sær eina eykaútreiðslu uppá 1.8 mió, innan forsorgarøkið. Talan er um uml. 80 fólk, ið kunnu fáa stuðul og peningur er ikki avsettur á fíggjarlógini og ikki umbiðin/játtaður í eykajáttanarlóg. Tí er omanfyrinevndi spurningur settur.

Landsstýrismaðurin í almannamálum hevur eisini boða frá at ávísir pensiónistar, ið vegna nýggju almannapensiónslógina, hava mist veitingar, skulu hava ymisk ískoytir í pensiónina. M. a. skulu fyritíðarpensiónstar giftir við ikki pensionistum hava ískoyti uppá kr 856, - um mðr. framyvir. Tá talan er um fleiri enn 400 pensionistar, verður eykaútreiðslan oman fyri kr. 4 mió. um árið. Hesin peningur er heldur ikki játtaður á fíggjarlógini. Aðrar ábøtur, ið landsstýrismaðurin eisini hevur lovað ávísum pensionistum eru truplar at gera upp í pengum fyrr enn málini eru lýst nærri.

Sostatt er fyribils talan um útreiðslur uppá uml. 6 mió, ið ikki eru avsettar á fíggjarlógini.

Í álitinum til fíggjarlóg fyri ár 2000, segið fíggjarnevndin m.a.

**„Gjøgnumskygni**

Fíggjarnevndin ynskir at gjøgnumskygni skal verða á galdandi fíggjarlóg. Undir viðgerðini hevur fíggjarnevndin umrøtt, í hvønn mun lógabundnar útreiðslur eisini skulu standa á fíggjarlógini fyri viðkomandi ár. Í § 43, stk. 2, í stýrisskipanarlógini er ásett, at eingin útreiðsla má verða goldin, uttan at heimild er fyri henni í teirri fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg, ið er í gildi, tá ið ávíst verður.

Spurningurin er, um ein vanlig løgtingslóg uppfyllir tey heimildarkrøv, sum § 43, stk. 2, setir fyri lógliga at brúka pening úr landskassanum. Av løgtingsviðgerðini av stýrisskipanarlógini skilst, at landsstýrið í upprunaliga uppskotinum hevði orðað § 43, stk. 2, soleiðis, at bara var heimilað at nýta pening, um upphæddin var játtað á fíggjarlógini. Undir málsviðgerðini hevði tingnevndin, sum viðgjørdi málið, frammi at skoyta uppí, at eisini kundi brúkast peningur, sum hevði heimild í „aðrari galdandi heimildarlóg".

Tá ið álit kom fyri tingið, hevði nevndin broytt hugsan soleiðis, at tað kom at standa: „ella aðrari játtanarlóg". Hetta merkir sbr. vanligum løgfrøðiligum tulkingargrundreglum, at ein vanlig løgtingslóg ikki er nóg góð heimild fyri at brúka pening, tað krevst, at útreiðslan skal standa á eini „aðrari játtanarlóg", sum má skiljast sum ein eykafíggjarløgtingslóg.

Harvið kann komast í ta løgnu støðu, at borgarin, sbr. eini vanligari løgtingslóg hevur krav um ávísa upphædd frá landsstýrinum og kann fara í rættin og fáa dóm við eftirfylgjandi tvingsilsfullgerð fyri upphæddini, meðan landsstýrismaðurin ikki hevur neyðugu heimildina sbr. § 43, stk. 2, at gjalda út peningin til borgaran, tí at upphæddin ikki stendur á fíggjarlógini ella á eini eykajáttanarlóg.


*Kristian Magnussen*

Henda løgfrøðiliga tvístøða má loysast á tann hátt, at § 43, stk. 2, má skiljast soleiðis, at hon setir krav um, at landsstýrismaðurin á økinum hevur eina rættarliga skyldu altíð at syrgja fyri, at uppskot, um neyðugt, verður lagt fyri Løgtingið sum eykajáttanarlóg í førum, har lógabundnar útreiðslur fara at hava við sær útreiðslur, sum ikki standa á fíggjarlógini. Men upphæddina, sum borgarin hevur krav um sbr. løgtingslóg, má hann gjalda, hóast peningurin ikki stendur á fíggjarlógini.

Tingið hevur, tá málið kemur fyri, tvinnar kostir í at velja, antin at játta peningin á fíggjarlógini ella at taka av vanligu løgtingslógarheimildina fyri útreiðsluni.

Samanumtikið er niðurstøðan, at tað er lógakrav, at lógabundnar útreiðslur altíð eisini skulu síggjast á fíggjarløgtingslógini ella á eini eykajáttanarløgtingslóg.

5.4 Lógarbundin játtan
*Lógarbundin játtan* verður nýtt, tá tað er bindandi ásett í aðrari lóggávu, hvør kann fáa pening, ella hvør skal rinda, og hvussu stór upphæddin skal verða. Sum dømi kann fólkapensiónin verða nevnd.

Talan er um lógarbundnar útreiðslur, t.d. tá ið móttakarin sambært lóg hevur rættarkrav til ávísan stuðul ella veiting, og tá ið peningaupphæddin ella útrokningargrundarlagið er ásett í lóg ella sambært lóg.

Tað er tí serliga umráðandi, at landsstýrismaðurin metir lógarbundnu útreiðslurnar á fíggjarlógini so neyvt sum gjørligt. Um tað í fíggjarárinum vísir seg, at hesar metingar væntandi ikki koma at halda, skal landsstýrismaðurin leggja uppskot um eykajáttanarlóg fyri tingið, ella í øðrum lagi uppskot um at broyta stuðulslóggávuna"

Tá spurningur mín ikki snýr seg um veitingar, ið borgarin hevði/hevur krav uppá eftir nakrari lóggávu, men nýggj tiltøk, ið landsstýrið ætlar sær undir fyri at bøta um ringastu fíggjarligu avleiðingarnar av nýggju pensiónlóguni, má metast at verða enn meira neyðugt at hava peningin játtaðan á fíggjarlógini, sambært tulking fíggjarnevndarinnar.

**Kristian Magnussen**
**løgtingsmaður**

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**

**www.sosialurin.fo**



FÍGGJARMÁLASTÝRIÐ
Føroya Gjaldstova
Tróðagøta 39, Postsmoga 2009, FO-165 Argir, Føroyar

**Starv á Føroya Gjaldstovu sum skrivari hjá stjóra/stjórn er leyst at søkja til setanar beinanvegin:**

- Skipa journal og taka móti posti
- Avgreiða skjøl hjá stovninum til bókingar og stemma av
- Fyrireika fundir
- Viðlíkahalda skriv, formalar o.t. á intra-/ internetinum

Útbúgving og krøv til viðkomandi, ið verður sett/-ur:

Viðkomandi, ið settur verður
- skal duga væl at skriva rætt føroyskt
- skal hava ástøðiligan kunnleika innan fyrisiting og roknskap
- skal verða førur fyri at átaka sær uppgávur fyri leiðsluna
- skal helst hava royndir sum skrivari
- skal helst hava kunnleika til journalisering

**Setanarviðurskifti:**
Starvið er lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

**Umsóknarfreist:**
Umsóknir við viðmælum og prógvum skulu vera Føroya Gjaldstovu í hendi í seinasta lagi mánadagin 24. januar 2000. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Leif Abrahamsen, stjóra.

**Á gjaldstovuni starvast umleið 30 starvsfólk. Gjaldstovan førir roknskap yvir játtanirnar á fíggjarlógini og førir m.a. eisini roknskap yvir ogn og skuld landskassans. Gjaldstovan stendur fyri inn- og útgjaldingum landskassans og hevur um hendi ein part av almennu lønaravgreiðslunum.**

**Spurnablaðskanning**
um framtíðar ynskiligt bústaðarmynstur

Vísandi til at Húsalánsgrunnurin fyrst í desember 1999 sendi út spurnabløð fyri at kanna tørvin á einum framtíðar ynskiligum bústaðarmynstri, undir heitinum eldrabústaðir, verður sagt frá at møguleiki er fyri at svara hesa vikuna afturat, og verður innlatingarfreistin sostatt sett til 10. januar 2000.

**Húsalánsgrunnurin**

**Dagstovnurin á Oyri**

Til dagliga reingerðing av Dagstovninum á Oyri verður hervið søkt eftir einum fólki at byrja beinanvegin.

Skrivlig umsókn skal verða Sunda Kommunu í hendi seinast 17. jan. 2000.

**Sunda Kommuna**
**460 Norðskála**
**Tlf. 422113**

*Lýsið í* **sosialinum**

VINNUHÚSIÐ
*House of Industry*

**Avloysari til skrivstovustarv**

Føroya Arbeiðsgevarafelag søkir eftir einum fólki til skrivstovuna at byrja sum skjótast sum avloysari fyri skrivstovufólk í barnsburðarfarloyvi.

Arbeiðið fevnir um skrivstovuhald, skrivaraarbeiðið, avgreiðslu og samskiftið við limir og viðskiftafólk.

Tað er ein fyrimunur um tú:
- hevur hóskandi útbúgving og arbeiðsroyndir
- dugir at arbeiða sjálvstøðugt og hevur góð samstarvsevnir
- dugir væl at samskifta á føroyskum
- hevur telduførleika á brúkarastøði (Windows Office forrit)

Vit kunnu bjóða eitt fjølbroytt og áhugavert skrivstovustarv og løn eftir avtalu. Starvssetanin varar væntandi til 1. september 2000.

Skrivlig umsókn, merkt »Skrivstovustarv«, eigur at vera okkum í hendi í seinasta lagi 14. jan. 2000. Ynskir tú at vita meira, ert tú vælkomin at ringja til Jan Mortensen, ella Bjørgfríð Ludvig á tlf. 311864.

**Føroya Arbeiðsgevarafelag**
**Vinnuhúsið,Postsmoga 179**
**110 Tórshavn**

Føroya Arbeiðsgevarafelag stendur fyri felags skrivstovuni hjá 11 vinnufeløgum og í løtuni starvast 5 fólk í umsitingini.
Feløgini í Vinnuhúsinum arbeiða fyri at tryggja føroysku vinnuni best møgulig kor. Hetta verður gjørt m.a. við miðvísum arbeiði og politiskari ávirkan. Feløgini taka sær av sáttmálum á privata arbeiðsmarknaðinum, veita limunum kunning og ráðgeving og skipa fyri vinnumennandi tiltøkum.

**Urtagarðsarbeiði**

Vit átaka okkum allar uppgávur viðvíkjandi nýgerð av urtagørðum herundir leggjan av flísum og smærri grótlaðingar. Somuleiðis átaka vit okkum røkt av urtagørðum og kunnu samstundis minna á at nú er rætta árstíðin at flyta/klippa trø og runnar.

**Fa. Urtagarðsrøkt v/ Mads Jensen**
**Nólsoy Tlf. 327131 - 283953**



MARCO POLO

søkir eftir
SERVITRISU m/k
Áhuga›i kunnu venda sær til
Tel. 213430

MARCO POLO

Smoga 1140 • FO 110 Tórshavn
Tel. 313430 • Fax. 313220

LÆRUPLÁSS Í ELDING • LÆRUPLÁSS Í ELDING

**Lærlingur**
til Elding í Havn

Til handilin í Havn søkja vit eftir lærlingi at byrja beinanvegin.

Handilin er førandi innan sølu av hvítvørum, musikkinstrumentum, radio- og sjónvarpstólum og øðrum el-tólum.

Vit bjóða tær eitt áhugavert lærupláss í einum spennandi og fjølbroyttum umhvørvi.

Tú ert ágrýtin og hevur hug og hegni til at veita kundum okkara eina góða tænastu.

Tað er ein treyt, at tú hevur FHS ella HH.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan 25. januar 2000, og skal sendast til

Elding sp/f
SMS
100 Tórshavn

ELDING
Klaksvík • Saltangará • Tórshavn

**Hús til sølu**

Um hóskandi boð fæst, eru eini endaraðhús í Vesturbýnum til sølu.

Byggiári: 1993. Húsini eru í tveimum hæddum á góðar 50m$^2$.

Niðara hæddin: Stova, køkur, fýrrúm og gond. Ovara hæddin: Hjúnarúm, 2 kømur, skápsrúm og baðirúm. Bilhús + parkeringspláss til 1 bil. Barnavinarligt umhvørvi. Gott útsýni!

Áhugaði ringið tlf. 318899 aftaná kl. 17.30, sendi teldupost: ovali@post.olivant.fo, ella vitjið heimasíðu okkara, http:/heima.olivant.fo~ovali/

**Dagrøktarmamma**

Søkt verður eftir dagrøktarmammum til Kommunalu Dagrøktina í Runavíkar Kommunu. Nærri upplýsingar starvinum viðvíkjandi fáast frá dagrøktarleiðaranum á tlf. 448594.

Skrivlig umsókn skal verða Dagrøktini í hendi í seinasta lagi 20.01.2000.




**Dagrøktarskipanin**
**í Runavíkar Kommunu**
Heiðavegur
600 Saltangará

